**Soli Deo Gloria, Klaksvík**
Sunnudagin kl 18 møti v/ Hjálgrím Davidsen.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Møti sunnukvøldið 11. febr. kl. 18 v/ Atla Rasmussen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Hjartaliga vælkomin.
Missiónsvikan verður í døgunum 1.-4. mars.

**Betania, Skopun**
Fríggjadagin kl. 20 verður møti v/Andreas Jørgensen.
Leygardagin kl. 14 verður barnamøti.
Leygardagin kl. 19 verður møti v/Andreas Jørgensen
Sunnudagin kl. 11 verður morgunmøti v/Andreas Jørgensen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Missiónsvikan heldur fram fríggjakvøldið kl. 20. Frans Jensen og Sigfred Johannesen tala, streingjakór av Tvøroyri syngur.
Leygarkvøldið kl. 20. Luttøka av Glyvrum við talu og sangi.
Sunnud. kl. 14. sunnudagsskúli, kl. 18. Møti við Sigfred Johannesen, Gullak og Jónhildu Hansen, streingjakór úr Porkeri syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
Møti verður fríggjakv. og leygarkvøldið kl. 20 og Sunnukvøldið kl. 18, Zacharias og Jógvan Zachariassen tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli.
Vikuskiftismøtir í skúlahøllini í Trongisvági! Hervið bjóða vit tær til møtir og frálæru har vit koma saman um Jesu navni. Gev tær tíð til eina innbjóðing!
Fríggjadag kl. 20 Evangeliskt møti.
Leygardag kl. 16 Frálæra um alkoholismu. Møguleiki verður at seta spurningar.
Kl. 20 evangeliskt møti.
Sunnudag kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin!

**Malta Hirtshals**
**Føroysk møtir í Suðurjútlandi.**
**Í Esbjerg fríggjakvøldið 9. febr.** í salinum hjá »Den Kristne Forsamling«, Spangbjerg Møllevej 16c Mølleparken kl.19.30.
**Í Sønderborg leygarkvøldið 10. febr**. kl.19.00 í »Skolehjemmet«, Sønderlandevej 28. Breyðbróting í somu hølum sunnumorgunin 11. febr. kl.10.00.
**Í Vejle, Staldgårdsgade 4 (hølini hjá Frelsens hær)** sunnudagin 11. febr. breyðbróting kl. 16 og evangeliskt møti kl. 17.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Felagið Tórshavn, gongutúr**
Sunnudagin 11. februar verður gongutúrur: Konufelli. Túrurin er tungur. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir og drekkamunn við. Farið verður av Kunningarstovuni. Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Vikan 12.-16. februar***
***Mánadagin 12. februar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi 1
kl. 14-17 Kortspæl, telving, kánus, landastrok o.o. spøl
***Týsdagin 13. februar***
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14 Málprát. Jóhan H. W. Poulsen
***Mikudagin 14. februar***
kl. 10-13.30 Matgerð - Anne G. Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur - Elisabeth Andreassen og Randi Petersen
***Hósdagin 15. februar***
kl. 10-10.30 Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 11-12 ***Lesibólkur*** - (Hvønn 1. hósdag í hvørjum mánaði.) Bókin: Úr køksvindeyganum, Oddvør Johansen.
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum - Alma Poulsen
***Fríggjadagin 16. februar***
kl. 10-13.30 Matgerð - Anne G. Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 15-17 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394. LP@email.fo

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnakvøld týskvøldið 6.2. kl. 19

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Frá Dagtilhaldinum à Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
er opið týsdag til hósdag, kl. 15-18.
***Týsdag*** ymisk spøl.
***Mikudag*** ítriv v/ Rigmor.
***Hósdag*** fimleikur v/ Áshild.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Skrá fyri viku 7.***
***Mánadagur 12. febr.***
Fimleikur og felagssangur.
***Týsdagur 13. febr.***
Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
***Mikudagur 14. febr.***
Enskt v. Annette Gaardlykke.
***Hósdagur 15. febr.***
Myndaveving v. Gretu Olsen.
***Fríggjadagur 16. febr.***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 12. februar***
lesa framhaldsøgu.
***Mikudagin 14. februar***
Vilhelmina Larsen vitjar.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik

*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.


**Mentamálaráðið**
YRKISDEPILIN

## LEIÐARI TIL YRKISDEPLIN

**Vilt tú verða við til at styrkja og menna yrkisútbúgvingarnar?**
**Hevur tú visjónir, hug og hegni, so ert tú leiðarin, ið vit leita eftir**

Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum og ágrýtnum leiðara til Yrkisdepilin.

Høvuðsuppgávan hjá leiðaranum er at vera skrivari hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og fyrisitingarleiðari í Yrkisdeplinum.

**Uppgávurnar eru m.a.**
Skrivari hjá Yrkisútbúgvingarráðnum:
- at fyrireika mál til ráðsfundir og avgreiða ráðsmál
- at vera skrivari hjá ráðnum og bólkum, ið ráðið setir
- at fyriskipa menningarátøk hjá ráðnum.
- at samskifta/samstarva við myndugleikar, felagsskapir, virki og stovnar.

Fyrisitingarleiðari í Yrkisdeplinum:
- at hava fyrisitingarligu leiðsluna av deplinum
- at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni og rakstrar- og menningaruppgávum
- at gera uppskot til fíggjarætlanir fyri depilin
- at tryggja, at depilin verður rikin so skilagott sum til ber
- at tryggja ein góðan starvsfólka- og menningarpolitikk

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjari m.a.
- hevur útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving,
- hevur hug og hegni at leiða, er sjónlig/ur í leiðarastarvinum, og dugir væl at lýsa sjónarmið fyri øðrum
- er tænastusinnaður, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til at samstarva
- hevur førleika at menna samstarvið við vinnulívið og áhugafelagsskapir
- hevur áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir
- hevur skil fyri fíggjarstýring og hevur góðar fyrisitingarligar førleikar

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Vit bjóða**
Eitt sera spennandi og avbjóðandi starv við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við avritum av prógvum o.ø. skjølum, upplýsingum um royndir og førleika v.m. skal sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

Telefon 355050 – Fax 355055
Ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. januar 2007, kl. 16.00

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Eyðbjørn Poulsen, deildarstjóra, á tlf. 355075 ella á 555075.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
**Yrkisdepilin**, ið er ein deild undir Mentamálaráðnum og fyrisitur arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmál, herundir at vera fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum. Yrkisdepilin fyrisitur eisini ávís viðkomandi málsøki fyri Mentamálaráðið, herundir at avgreiða ferða- og lønarendurgjald til lærupláss o.l.